## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til grein í Sosialinum 17. februar

**Petur Jacobsen**
*Rás 2*



Vísandi til úttalilsi frá Bjørn Juell Sundbye frá Gramex í Sosialinum um ymisku prísirnar kunnu vit spyrja okkum sjálvi um tað nú er so gott fyri føroyskt tónleikalív at Gramex krevur so stórt gjald frá føroysku útvarpsrásunum.

USA, Australia og fleiri onnur lond í heiminum loyva ikki Gramex at krevja tónleikagjald frá útvarpsrásum av teirra útgávum, tað vil siga at tað kostar onki hjá okkum at spæla henda tónleik. Skulu vit hinvegin spæla føroyskan ella norðurlendskan tónleik skulu vit gjalda næstan kr. 2,- pr. minutt til Gramex.

Tað endaliga gjaldið hjá útvarpsrásunum til Gramex er sett eftir, hvussu nógvur tónleikur sum ikki er frá USA/AUS verður spældur.

Hvat halda tit útvarpsrásirnar í Føroyum; Rás 2, Lindin og Útvarp Føroya helst velja???? Ja, sjálvandi, og tað gevur so aftur minni til føroyska tónleikalívið, bæðið frá Gramex og sanniliga eisini frá Koda sum útbetalir eftir sama rapporteringslykli frá rásunum.

Amerikanarar o.a. hava fyri langari tíð síðani sæð hesa foringina í marknaðarføringini av teirra tónleiki. Ein fløguútgáva hjá t.d. Teitur Lassen, útgivin av einum amerikanskum felag er Gramexfrí hjá okkum at spæla.

Prísurin í danska ríkinum - sum helst er hægstur í verðini - eigur sjálvandi at verða eins fyri allar rásir av sama slag og stødd, alt annað er diskriminering. Tað sum Bjørn Juell Sundbye frá Gramex vísir á, er reingjan av sannleikanum.

At tað eru ymiskir prísir galdandi vita vit av, tað eru almennar rásir, handilsligar rásir og ikki handilsligar rásir, Rás 2 er ein handilslig rás við upp til 50.000 íbúgvar og er taksturin fyri tær kr. 0,46 kr. pr. minutt at vit gjalda 400% er heilt burturvið. Gramex er enn ikki komin fram við nakrari frágreiðing um prísmunin. Tað rættvísgerð ikki prísmunin at hann er fleiri ára gamal, tvørtur ímótið, hann skal rættast beinanvegin.

At áleggja okkum at gjalda tað sama sum Útvarp Føroya er púra burtur við, so skulu tær landsdekkandi privatu handilsligu útvarpsrásirnar í Danmark so sum Sky Radio gjalda tað sama sum DR, kanska einar 70-80 mill.kr. um árið, Tá hevði bert tann eina rásin verið í danmark og tað er almenna DR.

At siga at ein avtala er gjørd um prísin við Rás 2 er eisini lygn, vit eru ongantíð, hóast fleiri áheitanir frá okkum, sloppin framat samráðingarborðinum við Gramex, okkum varð upplýst at hetta er prísurin vit skuldu gjalda, her er ongin samráðing.

Spurningurin er enn: Hví er prísmunurin 400% á Rás 2 og einari líknandi rás í Danmark?

Vónandi kemur svarið skjótt.

At víst verður á at kr. 234.000,- frá Gramex komu aftur til Føroya í 2004?

Ja! Helst hevði tað glett okkara tónleikarar at vita hvør fær pengarnar, kanska Gissur Pætursson og Kristian Blak kenna svarið.

# Skemtiligur 5-ari

**Jákup Petersen**
*yvirlækni*



Lat meg fyrst rætta ein feil, sum kom í greinin mína um kyksilvur, skrivað í endanum á januar mánaða. Eg skrivaði at yvirlækni Fróði Joensen varð við í hesum kanningum. Tad er ikki rætt. Tað skuldið sjálvandi verða Fróði Debes. Eg fari at biðja yvirlækna Fróða Joensen um umbering fyri hesa villu.

*Annars standi eg fullt og heilt inni fyri tí sum eg skrivaði í greinini. Nevniliga:*

At tað ikki kann ávísast at nakað einstakt barn í Føroyum hevur fingið skaða av, at mamman hevur etið grind!

At drúgvar, stórar og alheims viðurkendar granskingar á Seychellunum leiddar av heimskenda amerikanska kyksilvurgranskaranum Dr. Thomas Clarkson hava ikki víst nakað árin á børnini. Hetta sjálvt um mammurnar har høvdu munandi meira kyksilvur enn føroysku mammurnar!

At kyksilvurvandin fyri børn og vaksin í Føroyum stendur ógvuliga niðarlaga, tá hugsað verður um veruligu heilsuvandarnar fyri børn og vaksin í Føroyum!

At nógva umtalan av kyksilvur í Føroyum er við at leiða fólk frá teimum verunligu heilsuvandunum!

**5-arin**

Tað varð tí eitt sindur skemtiligt, at verða við á einum horni í útvarpssendingini 5-arin mikukvøldið har temaðið varð - um vit gerða ov nóg burturúr at ávara móti kyksilvurvandanum. Byrjanin varð sámulig við viðkomandi innleggum, men so tók Pál Weihe yvir. Eg má siga, at eg eri ikki sørt hugtikin av evnunum hjá Pál at stýra einum kjaki. Programmleiðarin og Pál tosaðu hugnaliga og leingi um ymisk fyribrigdi í føroysku kyksilvurkanningini. Smálutir í kanningini fingu gjølla viðgerð og fyltu stóran part av programmtíðini.

Neyðarsligu royndirnar hjá mær og Tomas Hans vóru meira ella minni skúgvaðar til viks við orðum so sum "ja, tað skal man eisini hugsa um". Ella varð ein beinleiðis avbrotin í sínum innleggum. Royndirnar hjá mær at fáa eitt meira breitt orðaskifti eydnaðust ikki. At 2/3 av teimum fólkunum sum atkvøddu við telefon meintu, at ov nógv varð gjørt burtur úr kyksilvurvandanum, varð ikki nakað sum imponeraði programmleiðarin. Hesin stóri bólkurin av føroyska fólkinum fekk heldur ikki eitt bein til jørðina, tá fólk um landið skuldu siga sína meining. Tað endaði enntá við at programmleiðarin fyri opnari mikrofon bað Pál Weihe um, at kanna hana persónliga fyri kyksilvur. Ja, eg taki hattin av fyri Pál Weihe har fekkst tú minst 1 - 0.

Hinvegin meini eg ikki at føroyska fólkið fekk 1 - 0. Teir 2/3 af øllum fólkunum sum ringdu inn og mettu at ov nógv verður tosað um kyksilvurvandan, sita helst sum kánus. Enn ein propaganda sending um føroysku kyksilvurkanningina! Eg haldi heldur ikki at føroyski journalistikkurin vann sær nakrar rósur hetta kvøldið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

# "Kultura"

## - Óli í Skúla var konstitueraður sýslumaður

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**
*rithøvundur*



Í útvarpssendingini "Kulturu" mánakvøldið og endursend mikumorgunin ummælir Finnbogi Ísakson bók mína "Kaj" ein dokumentarisk ævisøga. Tøkk skal hann hava fyri frálíka ummælið, tað fløvar hjá skapandi fólki ikki at vera gloymd burtur. Tað gleddi meg serliga nógv, at Finnbogi hevur lagt til merkis, at talan er um eina óvanliga bók, og tað má væl merkja at mørk eru flutt á ein ella annan hátt og bókin ikki bara er eitt kopi at tí sum undan er komið.

Eg er fegin um øll um ummæli og umrøðu og sera fegin um, at allir fjølmiðlar hava hildið mína bók verið so áhugaverda, at teir hava nýtt nógva blaðrúm, og senditíð til at umrøða og ummæla hana. Tað liggur mær ógvuliga fjart at fara at viðgera ummælir í fjølmiðlunum, tey eru kærkomin, bæði tey góðu og tey ringu og verða ongantíð annað enn tað ein einstakur brúkari sær í einum verki. At eg so heilt undantikið geri tað hesu ferð, kemst av at tað ikki er heilt rætt, tá ið Finnbogi sigur, at Óli í Skúla ikki var sýslumaður í Norðoyggjum. Óli í Skúla ella O.F. Joensen var fyribilssettur sýslumaður í mong ár, tí sitandi sýslumaður, leirvíkingurin Clement Olsen, hevði so nógv um at vera sum politikkari. Clæmint Olsen var sýslumaður í Norðoyggjum í samfull 40 ár frá 1870 og fram til 1910. Hann umboðaði Norðoyggjar á tingi í 33 ár, var landstingsmaður í átta ár og fólkatingsmaður í trý ár. Tá íð tíðini var var ikki lætt at ferðast, og ein maður við so tungum álitisstørvum, kann ikki hava verið nógv heima Klaksvík. Í hvussu er frá 1902 og fram til 1910, tá ið Clement Olsen fer frá sum sýslumaður vegna aldur, røkir Óli í Skúla, sýslumannsembætið og tað er hann sum avgreiðir málini hjá sýslumanninum meginpartin av tíðini hetta tíðarskeið. Hann er einans 26 ára gamal í 1902.

Hann undirskrivar seg konstitueret sysselmand og ikki sum sýslumannsfulltrúi á hópatals skjølum frá hesum tíðarskeiði og eisini á einum sera tíðandi skjali um Hans Paula á Toftum, sum norðoyingar helst vilja, at Norðtoftir verða kallaðar.

Alt hetta kann lesast nærri um á síðu 45 og 46 í bókini hja Hjartvard E. Skálagarð, "Politi í Føroyum fyrr og nú" og í "Havið og Vit 1." eftir J. Símun Hansen á síðu 93. Og sjón fyri søgn kann eisini síggjast í sýslumannsprotokollunum á Føroya Landsskjalasavni frá hesum tíðarskeiði.

Finnbogi hevur tó rætt í, at Óli í Skúla ongantíð endaliga varð settur sum sýslumaður hóast hann droymdi um hetta. Tá Clæmint Olsen fer frá í 1910 søkir Óli í Skúla og ein adressa gekk runt í Norðoyggjum honum til frama, hann fekk serliga nógvar undirskriftir i Svínoy og bygdunum í Fugloy, men ikki nóg mikið til til at gerast sýslumaður. Næstu 16 árini, fram til 1926, situr streymnesmaðurin Thomas Juul Petersen sum sýslumaður í Klaksvík. Hann var faðir tann seinni so kenda politikkaran og bankastjóran Thorstein Petersen.

Eitt havi eg lært hetta seinasta árið, at tað er næstan ógjørligt heilt at lúka eina bók fyri feilir og mistøk. Í mínum føri gjøgnumgingu tíggju fólk mítt handrit, øll fólk serfrøðingar á sínum øki og við hollari vitan um evnið, men allíkavæl standa feilir eftir. Tað fer kalt niður eftir rygginum, tá eg hugsi um hvussu bókin hevði sæð út um ikki hesi trúføstu og hollu hjálparfólk ikki vóru komin við týdningarmiklum ábótum. Tøkk eiga tey fyri tað.

Enn einaferð takk fyri góða ummæli Finnbogi, og tøkk til tykkum aftan fyri "Kulturu, fyri eina frálíka sending.